H71

faldari 9

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

H71 - KÍF

Sunnudagin 29. mars kl. 16.00

Hoyvíkshøllin

BONUS er billigari!

J&K

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Advokatfelagið Yviri við Strond 4

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03

polytan

Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri

Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

EITT FRAMÚR VIKUSKIFTI Í EINUM FRAMÚR HONDBOLTSÁRI

Sannast má, at summar løtur eru betur enn aðrar her í lívinum. Skalt tú í lívinum uppliva og sansa tær ríku løturnar, so er fortreytin ofta at tú eisini upplivir og kennir til tær minni stuttligu heldur tungu løturnar í lívinum. Soleiðis hevur eisini kenst hjá okkum í H71 hesa síðstu vikuna. Fyrst skuldu vit mikukvøldi hin 18. mars spæla ímóti VÍF í AA deildini heima og sunnudagin skuldi vit í AA spæla ímóti Kyndil á útivølli. Soleiðis sum støðan er í deildini, so var talan um toppdystir í deildini, ið vit helst skuldu vinna, skulu vit gera okkum vón um at røkka finaluna, tó so, at hóast vit taptu ímóti VÍF mikukvøldið, so var ikki alt mist, um vit kundu syfta Kyndil sunnudagin.

At nógv stóð uppá spæl, sansaði ein beinanvegin í dystinum ímóti VÍF mikukvøldi. Ein stúgv stappað Hoyvíkshøll var karmar um ein, í øllum førum í fyrra hálvleiki, tensan og tættan dyst. Vit komu væl frá byrjan og vóru størsta partin av fyrra hálvleiki undan, tó so, at uppundir hálvleik fór VÍF framum og var á odda 13-14 í hálvleikinum. Tá farið var undir annan hálvleik, steðgaðu vit tó púrasta upp og út ímóti helvtin av øðrum hálvleiki var farin, áðrenn vit skoraðu yvirhøvur í hesum hálvleiki og tá var nakað seint at koma í gongd. Vit fingu tó minkað nakað um munin og komu á 15-17, men so skrædnaði heilt og vit fingu ongantíð fótin fyri okkum aftur og taptu stórt við 20-26. Summi tosaðu um ein avsmurning, tó var tað ikki heilt so galið, hóast vit taptu greitt.

At vit taptu ímóti VÍF, gjørdi uppgávuna ímóti Kyndli so sera einfalda. Taptu vit, ja so vóru vit úti úr kappingini um finaluplass. Vunnu vit hinvegin, ja so kunnu vit sjálvir avgera um vit koma í finaluna ella ikki. H71

framhald á síðu 13

framhald av síðu 4

hevur altíð havt tað lættari við greiðum setningum, har ryggurin er ímóti múrinum og tað sannaðu vit so sanniliga eisini í dystinum ímóti Kyndli. Frá fyrsta bríksli vóru leikarar okkara tendraðir og hugsavnaðir uppá at geva sítt besta. Vardu sum úlvar á skóg og vóru alla staðni í álopinum. Vit góvu ongantíð kyndilsmonnum frið í fyrra hálvleiki og gav hetta eisini at bíta. Tá fyrra helvt av fyrra hálvleiki var leiktur løgdu vit av álvara sjógv millum okkum og kyndilsmenn og tá farið var til hálvleik vóru vit á odda 12-17, eftir eini løtuna at hava fört heili 9-16. Men eins og í dystinum ímóti VÍF, so steðgaðu vit púra upp í byrjanini av øðrum hálvleiki og áðrenn eins visti av, so varð greiða leiðsla okkara tódnað inn til bert eitt mál ella 17-18. Tá ressaðust vit við aftur og løgdu okkum framum 17-21 og við einans 10 minuttum eftir at leika, so var ein sigur í eygsjón, tó so, at einki var avgjørt enn. Kyndil kom eisini inn á okkum aftur til 19-21, men svaraðu vit aftur til 19-23 og hóast nakað var eftir at leika, so var sigurin eftir hetta ikki í vanda og vunnu vit 22-25. Eins sera avgerandi sigur, ið gevur okkum møguleika fyri sjálvir at avgera um vit skulu í finaluna ella ikki. Vit hava tríggjar dystir eftir, fyrst er tað KÍF á heimavølli, síðani Team Klaksvík á útivølli og loksins STÍF heima. Vinna vit allar, so eru vit í finaluni. Hin vegin hevur Kyndil dyst ímóti VÍF á útivølli eftir og er hetta ein trupul uppgáva fyri teir. Tapir Kyndil fyri VÍF úti, so hava vit ráð til at tapa ein dyst. Hetta er sjálvsagt alt bert teoretiskar spekulatiónir. Hvørt vit koma í finaluna ella ikki, verður so undir øllum umstøðum avgreitt næstu tvær vikurnar. Livst so spyrst.

Men tað var ikki bert AA lið okkara, ið hevur verið í dysti hesa vikuna. Næstbesta lið okkara í vaksnamannadeildini spældi bæði mikukvøldið ímóti VÍF og sunnukvøldið ímóti Kyndli. Næstbesta lið okkara vann báðar dystirnar og kann aftur í ár kalla seg vinnari av næstbestu deildini, har vit nú hava verið at kalla einaráðandi í fleiri ár.

2 lið hjá monnum (old boys okkara) vóru komnir í finaluna og varð hon leikt ímóti STÍF á uttanveltaðum vølli í Kollafirði leygarkvøldið og vunnu vit eisini hana við 28-23. Ein stuttligur sigur, í eini deild vit ikki hava verið so eyðsýndir seinastu árini.

Dreingir 18 leiktu avgerandi dyst á Skála leygardagin og eftir at hava verið greitt á odda allan dystin, varð sigurin tikin frá teimum seinastu minuttirnar og taptu vit 24-23 og mistu samstundis møguleikan fyri at gerast føroyameistarar í hesi deild og mugu taka til takkar við silvurmerkjum.

Bæði dreingir 16A og dreingir 14A vunnu leygardagin sínar dystir ímóti VÍF og tryggjaðu sær silvurmerki í landskappingini í A-bólkinum. Dreingir 14 B hjá H71 vunnu eisini sín dyst um vikuskiftið og eru gullvinnarar í B-bólkinum.

Í bólkinum dreingir 12 er A-lið okkara meistari og B – liðið nummar 3. Somuleiðis eru í bólkinum dreingir 10A, A – lið okkara føroyameistari.

Í bólkunum Gentur 14 A og Gentur 12 A eru A – lið okkara eisini føroyameistarar.

Samanumtikið hava vit soleiðis tryggjað okkum 7 gullvinnaraheiti, nevniliga í 1 deild menn, 2 deild menn, Dreingir 14B, Dreingir 12 A og Dreingir 10 A, gentur 14A og gentur 12 A og 3 silvurvinnaraheiti, nevniliga í Dreingir 18A, 16 A og 14 A. Enn er sum sagt einki avgjørt í AA – deildini, men eru vit við í finaluresinum enn.

STAÐFESTAST MÁ SOLEIÐIS AT HETTA HIGARTIL HEVUR VERIÐ FRAMÚR HONDBOLTSÁR FYRI H71.

PARTILLE CUP 2015

H71 SKAL Á TRIÐJA SINNI LUTTAKA Í HEIMSINS STØRSTI HONDBÓLTSKAPPING Í GØTEBORG Í SUMMAR.

Tá skúlarnir enda fara hoyvíkingar í stórum tal av landinum antin við Norrønu ella við flogfari at royna seg ímóti hondbóltsleikarum úr øllum heiminum.

Fyrstu ferð H71 luttók í Partille Cup var í 2011. Tá vóru vit uml. 200 H71´arar - leikarar, systkin og foreldur.

Í 2013 væntaðu vit, sum fyriskipa, at ferðalagið fór at verða minni, tí færri foreldur kundi væntast at koma við, men tað vísti seg ikki at verða so. Ferðalagið var í 2013 enn størri og heili 250 fólk vóru við og H71 var millum 5 tey størstu feløgini, sum luttóku í kappingini hetta árið. Í 2015 luttaka vit við 17 liðum og hava 350 fólk nú boða frá, at tey ætla sær við til Gøteborg, so hóast talan er um kapping við omanfyri 20 tús. leikarum, so fara eyðkendu myrkareyðu H71-jakkarnir at síggjast aftur í mongdini.

Hví luttaka í slíkum kappingum kann ein spyrja. H71 er eitt felag sum stendur seg væl í heimligu kappingini, har vit hava nógv sera góð barna- og ungdómslið. Vit hava nógvar góðar og ágrýtnar leikarar sum vilja nakað við hondbóltinum. Luttøka í slíkari kapping gevur okkum møguleika at meta okkum saman við teir bestu hondbóltsleikararnar í heiminum, og tað kann geva okkum íblástur og hug at menna okkum enn meiri.

Hóast vit fara avstað við nógvum sterkum liðum, so skal tað eisini verða pláss fyri teimum, sum ikki teljast millum tey allarbestu. Í Partille Cup luttaka bæði sterk og minni sterk lið, so øll hava onkran at spæla ímóti, sum hóskar til teirra støði. Tá tveir dagar av kappingini eru farnir, verður býtt upp í ein a og ein b bólk og so møtast meiri jøvn lið hareftir.

Slík ferð er ikki bara hondbóltur, men gevur øllum leikarum og foreldrum upplivilisir, og er sera týdningarmikil fyri samansjóðing av bæði leikarum og foreldrum í felagnum. Hóast hóndbóltur er týdningarmikil, so er tað sosiala eisini av alstórum týdningi, og læra bæði børn og foreldur hópin av nýggjum fólkum at kenna á slíkari ferð.

Luttøka í altjóða hondbóltskapping er kostnaðarmikil. Fyri at tryggja øllum leikarum møguleika at koma við, hevur verið skipað fyri nógum ymsum peningainnsavnandi tiltøkum, har dansitiltakið 80-ini umaftur hevur verið tað størsta og mest krevjandi. Komandi tíð fara okkara leikarar at ganga í húsini at selja SKAVA OG VINN seðlar og vit fara eisini at hava onkra fløskuinnsavning. Vónandi taka fólk í Hoyvík væl ímóti teimum og bera yvir við, at tey kanska koma fleiri ferð á gátt. Ætlanin er eisini at skipa fyri familjutiltakinum HURLUM HEY í maj, og fara vit harumframt at hava eitt marknaðarvikuskifti, har fólk kunnu leiga borð og selja ting, sum tey ikki longur hava tørv á, men sum kunnu gagna onkrum øðrum.

Hondbóltskappingin er nú um at enda, og vit fara at halda ein støðg í apríl. Í maj byrja vit aftur at venja og fara eisini at venja uttandura, sum liður í okkara fyrireiking til Partille Cup.

Takk fyri eitt gott hondbóltsár

HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

Aldur:
17 ár

Hvørjum plássi spælir tu a:
vinstra bakki

Hvør AA leikari heldur tú er løgnastur:
Djóni West Højgaard

Dovnastur:
Sigmundur N.

Drama queen:
Jesper

Flottastu reyv:
heilt klárt Ólavur Joensen

Longst tíð frammanfyri speglinum:
Andras Marr Poulsen

Stórsta hondbóltsuppliving:
tá vit vunnu IHF kappingina í Andorra við U20

Vaskar tú tini egnu klæðir:
ja, tað kemur fyri, tá pápi ikki er heima

Hvønn persón samber tú teg við:
tað má vera Trónd Arge og Uwe Gensheimer!

Skoraði tú nakað í seinasta dystinum
Eg skoraði tiðanverri einki mál seinasta dyst eg spældi, so nei.

Yndlings hashtag:
hashtags siga mær hvørki A ella B

Hvat ger H71 til besta felag:
gott samanhald og alt tað góða fólki rundan um felagið

Flóvisliga hondbóltsøgu:
Eg havi ikki dumma meg innan hondbólt enn, so eg havi onga flóvisliga honbóltsøgu at fortelja!

HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

Aldur:
11 ár / G12

Hvørjum plássi spælur tú á?:
Miðja og bakkur.

Hvør AA leikari heldur tú er løgnastur?:
Djóni Gaard.

Dovnastur?:
Tað man nokk verða Rúni.

Drama queen?:
Helgi Hoydal, hann skal altíð gera skuispæl.

Hvat er tín yndis sangur?:
H71 sangurin :)

Og títt yndis #hashtag?:
Eg havi aldrin brúk fyri hashtaggum.

Vel eitt ting at eta restina av lívinum:
Smoothie, vatn, frukt, grøntsakir, havragrýn, burritos, og rundstykkir. Eg dugi ikki at velja.

Hvønn persón samanberur tú teg onkuntíð við - í allari hemmeligheit?:
Ongan. Øll samanbera seg við meg.

Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?:
At eg spæli við H71. Tvætl. At vit eru sum ein stór familja. Øll í og rundan um felagi hjálpast væl til ... og vit vinna nógv.

Um tú hevði spælt við danska a-landsliðnum, hvørjum hevði tú viljað deilt kamar saman við?:
Ann Grete Nørgaard, tí hon virkar mest vanlig av teimum á liðinum.

Hvat ætlar tú tær at gera, táið tú verður vaksin?:
"Eg ætli mær at verða sjúkrasystir og professionellur hondbóltspælari."

Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltsøgu at fortelja?:
Ikki orduligt. Tað er altíð flovisligt, tá ið eg detti í einum dysti.

Skrivað hevur Kristianna Winther Poulsen

EITT TAK FYRI FELAGSSKAPIN

Annaðhvørt ár fara eini 300-350 børn og vaksin úr 188 Hoyvík til Gøteborg í Svøríki fyri at luttaka í Partille-cup, ið er stór altjóða hondbóltskapping, haðar fleiri túsund børn og ung úr øllum heiminum leita sær at vísa síni honbóltskynstur. H71 hevur luttikið í Partille síðani 2011, og til slíka ferð krevst fitt av pengum.

80INI Í FEBRUAR

Í 2013 stóðu Trina Jóhansdóttir og Sámal Paulason saman við øðrum foreldrum fyri tørni, tí nú var tað teirra túrur at fáa nakrar krónur í kassan. Skuldi tað vera køkutombola? Skuldu tey selja skava og vinn-seðlar? Ella skuldu tey bjóða seg fram at vaska bilar? – Vit eru ein bólkur av foreldrum, sum eru væl og koma nógv saman. Og onkursvegna komu vit í felag fram til hetta hugskotið við at skapa eitt tiltak, sum var eitt høvi fyri fólk á okkara egna aldri at fara út og hava tað stuttligt saman. Og tað vísir seg, at vit hava rakt røttu løtuna. Eftir jólarokið er januar sum oftast nokkso friðarligur, men í februar eru fólk aftur klár til, at okkurt stuttligt skal henda, fortelur Sámal, sum saman við Trinu og øðrum foreldrum er høvuðsfyriskipari av vælumtókta 80ara tiltakinum hjá H71, sum 21. februar í ár varð hildið fyri triðju ferð.

BAGAGURÚM VIÐ TÍ STERKA

Fyrireikararnir leggja seg eftir at skapa eina góða uppliving fyri tey, sum velja at brúka eitt leygarkvøld í februar í Hoyvíkshøllini. – Vit vilja, at fólkið er í fokus. Tey eru okkara gestir, og tey skulu kenna seg væl. Og tað er stuttligt at síggja øll hesi fólkini, sum ikki vanliga ganga í býnum. Tey eru glað og hava tað stuttligt, fortelur Trina.

Bagagurúmið eitur barrin, sum hegnisliga er bygd fyri at gera kensluna av fortíðini so veruliga sum gjørligt. Miðskeiðis í barrini stendur ein bilur við opnum bagagu-rúmi, ið, júst sum fyri 3 áratíggjum síðani, er fult av fløskum og teimum hvítu tundurkassunum, sum áðrenn vit fingu Rúsuna skuldu bíleggjast úr Danmark, um hugsingur kundi verða um eina líkinda kenning.

Høllin er væl pyntað til høvið, og ljós-show við rætta tónleikinum stuðla undir ta stóru árligu upplivingina av góðu, gomlu 80unum, tá ið Limahl-hár var hægsti móti, og tá ið cruisandi eysturoyingar við terningum og Wunderbaum í forrútunum og karamel-pappíri í ljósunum fyri at imponera damurnar við litaðum perum í bilinum lótu okkum vita, at 80ini vóru tíðin, tá vit øll vóru eitt sindur yngri, eitt sindur vakrari og møguliga eisini nøkur fá kilo lættari.

188 BYGDABALL

Høllin í Hoyvík tekur 850 fólk, og øll trý árini hevur verið útselt langa tíð frammanundan tað stóra kvøldið. Hví so ikki flyta oman á Nabb, har nógv fleiri fólk rúmast inn? – Tað kemur ikki uppá tal at flyta tiltakið í størri høli. Hetta skal

vera eitt ordiligt bygdaball, og sjarman er, at ballið er her í Hoyvík. Vit halda okkum innanfyri teir karmar, vit hava, og vit selja ta nøgdina av atgongumerkjum, sum vit hava loyvi til. Vit vilja levera vøruna, og at fylla 300 fólk afturat inn í høllina fyri at fáa fleiri pengar í kassan, hevði eingin fingið nakað burturúr, sigur Sámal avgjørdur.

Eftir øll trý tiltøkini hava verið skipaðar eftirmetingar, har bæði nevndin í H71, tónleikarar, plátuvendarar og øll tey, sum eru til arbeiðis, kunnu koma við teirra áskoðan á, hvussu komandi tiltøk kunnu gerast enn betri. – Vit fáa góðar afturmeldingar. Eisini foreldrini, sum eru til arbeiðis alla náttina, hava tað stuttligt. Felagsskapurin er so fantastiskur í H71. Meðan vit ofta hoyra, hvussu ringt onnur feløg hava við at fáa fólk at taka eina hond í, er hetta ongantíð nakað stríð her í Hoyvík, fortelja Trina og Sámal.

Eisini gestirnir bera seg fyrimyndarliga at. Eingin bardagi, bara gott lag. Kanska tí at gestirnir, sum fyri tað mesta eru 35+, ikki longur orka at berjast, viðmerkir Sámal.

NÓGVIR SNØKLAR OG NÓGV FÓLK

Fyri at alt tiltakið skal rigga, er sjálvandi nógv at fyrireika. Sámal ger tær neyðugu avtalurnar um útgerð, høli og við orkestur eitt heilt ár frammanundan stóra tiltakinum, meðan Trina og hini koma upp í leikin eitt sindur seinni í fyrireikingunum. – Eg broytist til Suffíu-mostur tær seinastu vikurnar, áðrenn tiltakið er. Tá er tað eg, sum gevi boð um tað, sum skal gerast. Og nógv er at orðna, tí nógvir snøklar skulu fáast uppá pláss. So vikan undan tiltakinum er rættiliga strævin, tí tá er nógv at minnast til. Vesi-vognur, borð, plattar til pall, teknisk útgerð, alt skal fella uppá pláss, fortelur Suffíamostir, alias Trina.

Tann stóri bólkurin møtir so tíðliga fríggjakvøld fyri at gera klárt, og sjálvt leygarkvøldið arbeiða tey antin í barrini, á gólvinum ella við øðrum uppgávum, sum skulu loysast. Síðani rudda øll, áðrenn tey fara heim sunumorgunin, tá øll kunnu fara til hús við vissuni um, at hølini kunnu latast eigaranum aftur í sama standi, sum vit fingu tey í. Í ár vóru eini 40 foreldur til arbeiðis tað stóra kvøldið, umframt truppurin á Atlantic Airways liðnum, sum so hugagóðir arbeiddu sum vaktir alla náttina á tamb, fortelur Trina um alt arbeiðið, ið er tengt at tiltakinum.

AVSTAÐ TIL PARTILLE

Trina og Sámal fluttu niðan til Hoyvíkar í 2001, og tá ið eldra dóttirin Silja í 2009 byrjaði at spæla hondbólt við gentum 10, gjørdust bæði tvey skjótt íðin stuðulsfólk hjá felagnum. Í dag spælir Silja við Gentum 14, meðan yngra dóttirin Bjørt spælir við gentum 10. – Øll tann tíðin, sum vit ikki hava, fer til sjálvbodna arbeiðið fyri H71. Tað skulu nógvir pengar til at reka eitt so stórt felag. Vit halda tað vera óluksáliga stuttligt, og tí tíma vit. Hetta gevur børnunum nógv aftur, og tað er eisini viktugt, at vit sum stuðlar vísa, at vit ynskja at hjálpa, siga Trina og Sámal, sum saman við døtrunum og fleiri hundrað øðrum H71arum í summar fara til Partille-cup í Svøríki, har nógv børn og ung úr Hoyvík sleppa at royna seg við hondbóltinum.

Myndir: Jan Sørensen

SENDISTOVAN

amr.fo

TEY SVØRTU TØLINI

DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

Dato	Heimalið	Útilið	Úrslit
28.09.2014	H71	Neistin	24-27
08.10.2014	VÍF	H71	25-22
11.10.2014	H71	Kyndil	19-18
19.10.2014	KÍF	H71	19-23
25.10.2014	H71	T. Klaksvík	33-12
02.11.2014	StÍF	H71	20-24
06.11.2014	Neistin	H71	18-30
16.11.2014	H71	VÍF	24-27
19.11.2014	Kyndil	H71	21-19
30.11.2014	H71	KÍF	26-26
05.12.2014	T. Klaksvík	H71	21-25
13.12.2014	H71	StÍF	30-25
20.12.2014	H71	Neistin	33-26
01.02.2015	VÍF	H71	25-19
15.02.2015	H71	Kyndil	22-18
18.02.2015	KÍF	H71	18-27
25.02.2015	H71	T. Klaksvík	37-16
01.03.2015	StÍF	H71	26-28
08.03.2015	Neistin	H71	24-25
18.03.2015	H71	VÍF	20-26
22.03.2015	Kyndil	H71	22-25
29.03.2015	H71	KÍF	
01.04.2015	T. Klaksvík	H71	
04.04.2015	H71	StÍF	

STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

Nr.	Lið	Dystir	V.m	T.m.	Munur	Stig
1	VÍF	21	604	492	112	34
2	Kyndil	22	516	454	62	31
3	H71	21	535	460	75	29
4	KÍF	21	558	554	4	21
5	Neistin	22	550	607	-57	18
6	StÍF	22	545	584	-39	11
7	T. Klaksvík	21	460	617	-157	6

LIÐINI HESUFERÐ

H71

Málmenn:
1 Ári E. Dam
16 Tóraldur kollsker

Útileikarar:
3 Mark Lauser Marcher
4 Rúni V. Højgaard
5 Bogi G Davidsen
6 Djóni V. Højgaard
8 Pætur Thomsen
10 Hallur Biskopstø
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
21 Jesper Pedersen
22 Helgi Hoydal
23 Hilmar Leon Jakobsen
99 Tróndur Arge

Venjarar:
Halgir Dahl Olesen og Petur Mittún
Málmansvenjari:
Jens á Skipagøtu
Liðleiðari:
Rene Dahl Olesen
Andras Marr poulsen

KÍF

Málmenn
1 Pætur Hjørtur Skýlindal
12 Kristofer Mikael Karlsson

Útileikarar
2 Andrias Nielsen
5 Janus Jakobsen
9 Pætur Johannesen
13 Tony Weyhe
17 Teitur Joensen
19 Hjalti Hammer Matras
21 Poul Finnur Egholm
27 Hans Eli Sigurbjørnsson
29 Rógvi Weyhe
33 Fríði Weyhe
34 Rúni Joensen
37 Jákup Trygvason
39 Ási Dam
47 Vilhelm Magnussen

Eddie Hjartvar Joensen
Jens K. Magnussen

Ernst Johannesen

Ítróttarfelagið Hoyvík H71
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

NEVND
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

ÁBYRGD AV FALDARA
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

MYNDIR
Jan Egil Kristiansen, 262240

ÚTGEVARI
H71

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT · JOHAN J. LAMHAUGE